Ár 2010, hin 26. januar

1.
10/00035 Vegaarbeiðir, fíggjað undir "Vegir, íløgur " í 2010.

Eins og undanfarin ár verður málið um nýtsluna av kontubólki "Aðrar vegagerðir" ella "Vegir Íløga", sum kontan eitur nú, lagt fyri nevndir og býráð, har sett verður upp ymisk vegaarbeiðir o.a., sum eru byrjað, og onnur arbeiði, sum hava verið í umbúna, sí tilmælið á síðu 4, sum sigur, at avmarkaða avsetingin til Vegir Íløga og stóri tørvurin sambært viðlagda mállista (ikki raðfestur enn) viðførir, at trupult er at gera tilmæli um, hvørji arbeiðir skulu raðfestast, tí uttan iva verður neyðugt at fremja nøkur av málunum, sum eru á nevnda lista. Mælt verður harafturat til, at liðugtgerð av Ringvegnum, útstykkingini undir Fossum, útstykkingini á Hjalla og á Norðoyri koyra sum sjálvstøðug projekt, sum verða fíggjað við staðfestari grundstykkjasølu. Hetta viðførir, at fíggjarætlanin verður hækkað, og at landsstýrið skal geva loyvi til fíggjarligu broytingina.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 08.05.09, og mælir til, at vegabreiðkanin í Árnafirði verður boðin út í bundnari útbjóðing. Nevndin mælir eisini til at kanna kostnaðin av at binda Klaksvíksskákið í Víkavegin, hetta vísandi til fíggjarætlanina fyri 2011.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku Nevnd 13.01.10.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt við tí broyting, at talan verður um innbodna lisitatión.

2.
09/744 Nøgdsemiskanning.

Víst verður til eina útgreinaða frágreiðing um eina kanning innan barnaansingina frá LÓÐUR.

Sosiala Nevnd hevur samtykt at gera nøgdsemiskanning við kr. 10.000,- pr. stovn. Peningurin skal finnast innan sosiala økið, og verður reguleráð í mei 2010.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 13.01.10 og mælir til, at kostnaðurin av kanningini verður lutaður út á hvønn stovn sær, og at hvør stovnur ber sín part av kostnaðinum innan fyri sín verandi fíggjarkarm. Um ein eykajáttan til skeiðsútreiðslur verður játtað seinni í 2010, verða hesar útreiðslur tá mótroknaðar hjá viðkomandi stovnum.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

3.
09/777 Áheitan um at seta fleiri fólk í starv á Barnaverndartænastuni.

Sosiala Nevnd viðgjørdi tilmælið frá umsitingini, dagf. 02.11.09, um at umskipa og økja um arbeiðsorkuna á Barnaverndartænastuni á fundi tann 04.11.09 og aftur 02.12.09. Nevndin samtykti á fundinum 02.12.09 at taka málið uppaftur til viðgerðar í januar

2010. Vísandi til omanfyri standandi verður málið lagt fyri nevnd til umrøðu og støðutakan.

Sosiala Nevnd tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 02.12.09. Peningurin verður tikin av rentuavlopinum.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 13.01.10.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

4.
09/00219 Systkinafrádráttur.

Sosiala Nevnd samtykti á fundi 13. mei 2009 at seta í verk systkinaavsláttur fyri árið 2009, sum er fylgjandi:

- 0% fyri dýrasta plássið

- 15% fyri næstdýrasta plássið

- 15% fyri triðdýrasta plássið

Nevndin samtykti somuleiðis á sama fundi at hækka omanfyri-standandi frá 15% til 20% í 2010. Sum umsitingin hevur gjørt vart við, kann roknast við eini ávísari variatión av kostnaðinum fyri kommununa, tí tað er variatión í, hvussu nógv systkin eru í ansingarskipanini.

Sosiala Nevnd hevur samtykt at halda fast við samtyktina hjá nevndini 13.05.09 um, at systkinaavslátturin verður 20%.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu nevnd 13.01.10.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

5.
09/00752 Fíggjarstøðan á tekniska økinum 2009.

Hetta mál, ið snýr seg um meirnýtslu á tekniska økinum, varð fyrru ferð samtykt í býráðnum 15. des. 2009 og skal samtykkjast 2 ferðir.

Fíggjarnevndin tekur undir við býráðssamtykt 15. des. 2009.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt 2. ferð.

6.
08/00033 Umbygging av Spinnarínum.

Víst verður til uppskot frá Jógvani Skorheim, dagf. 27.11.09 og tilmæli frá mentanardeildini 28.11.09, ið snýr seg um at 500.000 kr. verða játtaðar einum grunni, sum hevur til endamáls at fyri-reika og fremja verkætlanina Spinnaríið. Á

býráðsfundinum 15/12-09 samtykti býráðið at taka undir við tilmælinum frá MeN um at taka undir við uppskotinum.

Mentanarnevndin heldur seg til nevndarviðtøkuna 02.12.09.

Ein minniluti í Fíggjarnevndini, Jógvan Skorheim, tekur undir við Mentanarnevndini 02.12.09 og 13.01.10.

Ein meiriluti i nevndini, Gunvá við Keldu, Eyðgunn Samuelsen og Auðunn Konráðsson, mælir til, at málið verður tikið upp í samband við endurskoðan av fíggjarætlanini fyri 2010.

Býráðsins samtykt: Broytingaruppskot frá JNM um at beina málið aftur í nevnd, so tey formligu viðurskiftini verða fingið upp á pláss, fall við 5 atkv. fyri (JNM, EyS, ÓK, SOJ og HAB) og 6 ímóti.

Tilmælið frá MeN og minnilutanum í FíN fall við 4 atkv. fyri (ÓML, EGH, ASJ og JSkorheim) og 7 ímóti.

7.
09/00315 Bygging av røktarheimi í miðbýnum – uppskot – víðari gongd í málinum og val av bygginevnd.

Kommunan hevur fingið tilsøgn frá landinum um studningslán til bygging av røktarheimi til 24 búfólk. Kostnaðarmetingin er um 47 mill.kr. Kommunan hevur tikið hædd fyri sínum fíggjarparti av hesi íløgu við at seta neyðugu upphæddirnar av í ætlanunum fyri tey komandi árini. Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 29.06.09, skriv frá umsitingini, dagf. 06.11.09 og skriv frá borgarstjóranum, dagf. 19.11.09.

Sambært mannagongd fyri kommunalar byggiverkætlanir hjá Klaksvíkar Kommunu skulu strangar mannagongdir nýtast, tí talan er um verkætlan, sum kostar oman fyri 10 mill. kr. Nevnda reglugerð krevur, at ein bygginevnd við 5 limum verður vald at hava ábyrgdina av projektinum undir býráðnum. Sí skriv og frágreiðing frá umsitingini, dagf. 11.01.10. Mælt verður til, at ein bygginevnd verður vald sambært reglum kommununnar, sum í fyrsta lagi fær til uppgávu at lýsa verkætlanina. Mælt verður eisini til, at umsitingarleiðslan fær heimild til at samráðast við LV um eina avtalu um byggiharralut á sama hátt, sum er galdandi fyri byggingina av Skúlanum við Ósánna.

Sosiala Nevnd tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 11.01.10, men mælir til, at formaðurin í nevndini verður limur í stýrisbólkinum, og at Jancy B. Klein, sosialdeildarleiðari, verður við í bygginevndini.

Tekniska Nevnd tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 11.01.10, men mælir til, at formaðurin í Sosialu Nevnd verður limur í stýrisbólkinum.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 13.01.10 og Teknisku Nevnd 13.01.10.

Býráðsins samtykt: Tilmælið frá SoN, TN og FíN samtykt, og at velja Jákup N. Mikkelsen, umboðandi minnilutan, og Elsebeth G. Hansen, umboðandi meirilutan, í bygginevndina.